Landssjúkrahúsið

Tórshavn, 13. februar 2019

**Telduútboð til Landssjúkrahúsið**

Landssjúkrahúsið skal hervið biðja um tilboð uppá eina størri mongd av teldum. Teldurnar skulu nýtast í dagliga virkseminum á stovinum, bæði innan vanligt fyrisitingar og kliniska arbeiðið. Vanliga fyrisitingararbeiðið fevnir um tekstviðgerð, rokniark, framløgur, journal, internet osv., meðan ta kliniska arbeiðið fevnir m.a. um Journalskipanina Cosmic, BCCLab, Sectra RIS & PACS osfv. Dentur verður lagdur á, at teldurnar eru ætlaðar til Business/Professional.

Tað er eitt krav, at teldurnar lúka ásettu krøv og reglur í samtráð við trygdarpolitik og hondbók, og at teldumerkið er góðkent til brúk á Landssjúkrahúsinum.

Við hesum verða 50 farteldur og 20 stationerar teldur bjóðaðar út. Bæði farteldur, stationerar teldur og dokkingstøðir skulu vera av merkinum HP. Leveransan kann deilast í tvey, tó skal fyrsta leveransa verða uppá minimum 15 farteldur og 5 stationerar teldur.

Krøv til hardware:

| | **PC (stationerar)** | **Fartelda** |
|---|---|---|
| **Form** | All in one<br>Alternativt kann telda til áseting aftan fyri á skermi eisini brúkast. Alternativið skal Inkl. VESA.<br><br>Ynskiligt hevði verið við prísi til bæði All-in-one og alternativiið | Elitebook 840-serian, G4 ella nýggjari. |
| **CPU** | **Intel Core i5-8250U** ella betur | **Intel Core i5-8250U** ella betur |
| **RAM** | 8Gb ella meir | 8Gb ella meir |
| **Storage** | SSD >= 256GB stødd | SSD >= 256GB stødd |
| **Trygd** | TPM 2.0 ella nýggjari | TPM 2.0 ella nýggjari |
| **Skermar** | Minimum Full HD (1920x1080) | Minimum Full HD (1920x1080) |
| **Periferi** | USB mús og tastatur | Minimum USB 3 og USB typa-c |
| **OS** | Windows 10, tó ikki neðyugt, tí Landssjúkrahúsið hevur egnan licsene. | Windows 10, tó ikki neðyugt, tí Landssjúkrahúsið hevur egnan licsene. |
| **Annað** | Øko, lítil streymnýtsla.<br>Innbygt webcam er eitt ynski (vælsaktast til All in one).<br>Streymstikk skal vera **EDV stikk**.<br>Optión til IPS Skermar. | Lithium-ion battarí við minsta lagi 12 tíma livitíð.<br>Innbygd webcam, hátalarar og mikrofon.<br>Farteldan skal vera Elitebook.<br>Streymstikk nýtist ikki at vera EDV stikk. |

**Fyrisiting/KT-deild**
J.C. Svabosgøta 41-49 • 100 Tórshavn • Tel. (298) 304500 • fax 314253 • www.ls.fo • ls@ls.fo

Generel krøv:

- Streymstikk til Dockingstøð skal vera **EDV stikk**.
- Teldurnar skulu lúka umhvørvisgóðkenningar, ið eru galdandi til eina og hvørja tíð.
- Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.
- 3 ára garanti, frá tí at teldan er útflýggjað.

Sum optión vil Landssjúkrahúsið eisini hava prís til fylgjandi:

- **20 stk. vanligar HP dockingstøðir**, sum stuðla tveimum eksternum skermun tá farteldanteldan er dokkað (HDMI ella DisplayPort). Dockingstøðin skal kunna brúkast til HP EliteBook 840 Gx**.** Streymstikk skal vera **EDV stikk**.
- **20 stk. HP Dockingstøð USB-C**, sum stuðla tveimum eksternum skermun tá farteldanteldan er dokkað (HDMI ella DisplayPort). Dockingstøðin skal kunna brúkast til HP EliteBook 840 Gx. Streymstikk skal vera **EDV stikk**.
- **10 stk 34" Curved**. Einki beinleiðis krav til merki og model. Landssjúkrahúsið hevur tó eina blanding av Samsung og HP Curved skermum. Streymstikk skal vera **EDV stikk**.
- **80 stk 23" HP EliteDisplay skermar**. Streymstikk skal vera **EDV stikk.**
- **10 stk HP Healthcare Edition skermar (dicom standard)**. Streymstikk skal vera **EDV stikk.**

Tilboð verða vrakað, um tey ikki lúka krøv og ásetingar ið annars eru skrivaðar í útboðnum. Um veitari metir onkran óynsktan eginleika órímiligan ella ómøguligan, eigur tað at verða avklárað við at seta fram neyðugar spurningar í spurnarumfarinum.

Talan er í fyrsta umfari um nøgdina, ið er upplýst fyrst í hesum útboði, tó ynskir Landssjúkrahúsið at gera avtalu við tilboðsvinnaran um at veita teldur av sama merki og slag í 2 ár við optión at leingja við einum ári. Hetta er tó treytað av, at framhaldandi prísásetingin og treytir annars verða mettar nøktandi.

**HP grundgeving**
Fyri nøkrum árum síðani tók KT á Landssjúkrahúsinum eina avgerð um at leggja seg eftir at hava eitt teldumerkið. Í útboðnum í 2016 fall valið á HP og hava vit valt at halda áfram við hesum teldumerki. Ein av grundgevinginum fyri, at HP framhaldandi er valið, er fyri at tryggja kvaliteturin av KT veiting, umsiting og tænastu frá KT deildini. Við øðrum orðum, veita best møguliga tænastu, í mun til ta tilfeingi, ið er tøkt (tíð, starvsfólk, vitan og know-how, v.m.).

Landssjúkrahúsið metir, at allir veitarar í Føroyum hava møguleika fyri at bjóða HP teldur til kappingarføran prís.

**Framferðarháttar**
Tillutað verður fyri allar vørur undir einum. Tað vil siga fyri teldur, dockingstøðir og evt. skermar til "alternativið" samlað. Optionir verða tiknar við í samlaðu metingina.

Fyrst verður kannað eftir, um tilboðið lýkur krøv og ásetingar til hardware omanfyri. Síðani verða tilboðini viðgjørd og gjøgnum einkultvís. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

| Vekting: | % |
|---|---|
| Prísur | 75 |
| Útyvir minstakrav[1] | 5 |
| Optiónir | 20 |
| Samlað | 100 |

[1] Útyvir minstakrav er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða meira RAM, CPU o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

Landssjúkrahúsið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði, um tilboðini ikki fylgja ásetingunum, ella um tey ikki verða mett nøktandi.

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 til 2 vikur, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

Slíkir spurningar skulu verða settir fram skrivliga, og verða viðgjørdir skrivliga við við tí endamáli at kunna skjalprógva samskiftið, og fyri at tryggja gjøgnumskygni fyri veitarar.

Spurningar skulu stílast til:

Annfinn Thomsen
annfinn.thomsen@ls.fo

Spurningar og svar verða løgd dulnevndt út á innkeypsportalin hjá Gjaldstovini. Veitarar hava 14 dagar til at seta fyrispuringar til útveitingarskrivið.

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupost til

KT deildina, tpost: ktkeyp@ls.fo

Freistin at lata inn tilboð er fríggjadagindagin, 8. mars 2019, kl 12:00.